Vikuskiftis Sosialurin



# Sjarmerandi byrjan á Summar Festivalinum

**Grandma's Basement áttu, sum ivaleyst yngsti bólkur á Summarfestivalinum, heiðurin at lata festivalin upp. Hetta gjørdu teir eitt sindur trilvandi, men øgiliga sjarmerandi**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Flagsteltið var rættiliga tómt, tá bólkurin væl og virðiliga merktur av nervum fór á pallin. Bert ein tunn rond av heilt ungum áskoðarum stóð fremst við pallin, men alt fleiri fólk komu inn at lurta, sum framførslan leið.

## Leitandi úttrykk

Tónlistarliga var bolkurnin sera leitandi, og ringt er at koyra teir í nakran ávísan genru pott. Teir løgdu fyri við lagnum "Dansurin", ið fyrst og fremst sermerkti seg við at vera langt. Her spældu ikki færri enn tríggi gittarleikarar, uttan at hædd tyktist at vera fyri hesum í skipanini av løgunum, tað gjørdi ljóðmyndina óruddiliga, og í stóra tóma teltinum rungaði óljóðið.

Hóast tankarnir vóru leiddir til punkrokk ta fyrstu løtuna, so gjørdist skjótt greitt, at tað einasta punkutta við bólkinum var tey óruddiligu arrangementini, tað til tíðir nakað óskipaða spælið og so seinasta lagið, sum bólkurin spældi Smells Like Teen Spirit hjá Nirvana.

## Nýtt Dynamit

Bólkurin hevur seinastu tíðina verið nakað at hoyrt á Rás 2 við lagnum "Bangna beistið" Hetta lag var uttan iva tað lagið, ið riggaði best hjá unga klaksvíksbólkinum. Lagið flytur eins og eitt annað lag hjá teimum "Getse" tankarnar til ein annan og eldri Klaksvíksbólk, Dynamit, og í "Getse" í ein ávísan mun eisini til P.S. Men onnur løg vóru heilt øðrvísi, sum larmirokk lagið "Wake Me Up", Aria kenda lagið "Minnini" umframt lánilagið "Good enough" hjá Jens Marna og "Time After Time", sum millum onnur Cindy Lauper syngur. Stutt sagt ein stórt bland av nógvum ymiskum. Lániløgini vórðu spæld í nærum upprunaligum hami, og skilagott hevði verið, um bólkurin gav løgunum eitt sindur av teirra egna dámi. Men at døma eftir stóra fjølbroytninum, hevur bólkurin á ongan hátt sín egna dám enn.

## Sterkur oddamaður

Bólkurin hevur í sangaranum ein sera sterkan oddamann, hóast røddin enn er nakað merkt av at vera óroynd, so eru gávirnar eyðsýndar. Hann hevur sterka útstráling, sang við stórari innliving. Røddin hevði áhugaverdan klang, og eina náttúrliga kraftiga styrki. Við tiðini kunnu hann og bólkurin gerast sera spennandi.

Basement er ein nýggjur bólkur, og framførslan var merkt av hesum. Rútmu parturin virkaði dekan ov primitivur, og fleiri av limunum sóu beinleiðis fjáltu rstungnir út. Bert sangarin og tann eini gittarleikarin livdu á pallinum. Tað var ikki fyrr enn síðst á konsertini, at restin av bólkinum fór at flyta seg.

## Fesk smakksroynd

Summarfestivalurin helt í ár fast í einum sera góðum siði, at lata eitt óroynt nýtt navn lata festivalin upp. Eftir, at Prix Føroyar fór í søguna, er tað vorðið heilt forkunnugt at hoyra óroynd tónleikanøvn á stórum pallum. Tey mongu sum ikki ganga á konsertir í Virkishúsinum og Margarinfabrikkini ella Losjuni við Gøtugjógv hoyra nærum ongantíð nýggj og óroynd nøvn. Tað er tí vert at taka hattin av fyri Summarfestivalinum, sum í fjør lat "25 oyra" lata festivalin upp og í ár valdi at leggja fyrsta pallin til Grandma's Basement. Ein fín og hóskandi byrjan, ið gevur hesum bólkum góðar og neyðugar royndir.



*Guittarleikarin í Grandmas Basement*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Swingandi



*Flest øll gjørdust sjónliga glað av tónunum hjá Smokie, ið jú er súpan, ið ikki er herkin, men glíður væl niður hjá flest øllum, uttan mun til aldur ella hvønn tónleik ein vanliga setir undir nálina*

**Glaðir tónar og gott og lætt undirhald. So einfalt kann tað sigast, og hetta lýsir helst kenslurnar í Klaksvík hóskvøldið, tá Smokie spældi, men so einføld er søgan helst ikki. Í øllum førum kundu fá siga seg ónøgd ella keddan, tá Smokie høvdu verið á palli við kæti, orku og samspæli við stóru fjøldina. Smokie eru Smokie, og her liggur helst partur av loyndarmálinum**

SUMMAR FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir; Álvur Haraldsen*